## Rætturin til tað góða lívið

Mánakvøldið 16. mars klokkan 19.30 verður eitt áhugavert tiltak á Seglloftinum á Tvøroyri. Tiltakið hevur heitið "Rætturin til tað góða lívið". Vit góðtaka, at mamma og pápi kunnu drekka rúsdrekka. Sum samfelag góðtaka vit, at fólk hava frælsi at drekka - og at drekka seg full. Men við hesum verða vit eisini noydd at hava í huga, at nýtsla av rúsdrekka kann taka tað góða lívið frá teimum nærmastu - teimum avvarðandi. Ætlanin við tiltakinum á Seglloftinum er at varpa ljós á teir trupulleikar rúsdrekka hevur við sær, ikki fyri misnýtaran, men fyri tey, sum eru um hann - tey avvarðandi. Hvørt tað so er ein maki, børn ella foreldur, so verða tey ávirkað av misnýtsluni hjá misnýtaranum. Hetta kann hava ógvusligar fylgjur á lív teirra. Tiltakið á Seglloftinum verður skipað sum ein pallborðsfundur. Við pallborðið sita tvær kvinnur og ein maður, sum hava merkt, hvat tað er at liva saman við einum rúsmisnýtara, á ymiskan hátt – bæði sum barn og sum maki. Eisini verður umboð fyri Blákrossheimið við pallborðið. Tiltakið er alment og ókeypis, og høvi verður eisini at seta spurningar og gera viðmerkingar. Tað er Blái Krossur Føroya, sum skipar fyri tiltakinum.

## Ungdómsgudstænasta

Komandi leygarkvøld 14. mars klokkan 20 verður ungdómsgudstænasta í Vesturkirkjuni. Ten-Sing kórið hjá KFUM í Havn syngur nakrar av sínum vælkendu sangum. Bergur D. Joensen prædikar. Eisini verður høvi at tendra ljós fyri onkrum, sum ein vil minnast. - Altargangur verður, og sjálvsagt eisini drekkamuður aftan. Ung standa fyri sanginum og taka lut undir gudstænastuni. Øll eru vælkomin, sigur Bergur Debes Joensen, prestur. Á myndini síggjast konfirmantar á útferð í Kirkjubø.

# Føroyskt tryggingarfelag hevur mist 200 milliónir




*Fíggjarkreppan hevur sviðið fast hjá føroyska tryggingarfelagnum, Lív, men stjórin heldur, at støðan kundi verið nógv verri*

**Altjóða fíggjarkreppan hevur rakt føroyska tryggingarfelagið, Lív, hart, men hóast felagið hevur mist 200 milliónir upp á partabrøv, heldur stjórin, at tey eru sloppin væl**

FÍGGJARKREPPA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Altjóða fíggjarkreppan hevur rakt føroyska tryggingarfelagið, Lív, hart.

Tað er greitt, nú roknskapurin fyri 2008 er gjørdur upp og verður almannakunngjørdur í næstu framtíð.

- Vit hava sanniliga merkt fíggjarkreppuna, men hóast tað svíður ivaleysa fast, haldi eg, at vit eru sloppin heilt væl, sigur Tummas Eliasen, stjóri í Lív.

### Mist 200 milliónir

Hann sigur, at tilsamans hevur Lív eitt negativt avkast upp á 7% í fjør og tað heldur hann er ikki so galið, tá ið hugsað verður um, hvussu fíggjarkreppan hevur rakt alla aðra staðni.

- Tilsamans eru partabrøvini, vit eiga, fallin 45% í virði og tað hevur givið okkum eitt tap upp á 200 milliónir upp á partabrøvini í fjør. Men afturfyri hava lánsbrøvini kastað so mikið meiri av sær, so at tilsamans verður talan um eitt negativt avkast upp á 7%.

Tummas Eliasen sigur, at samanumtikið halda tey, at tey eru hampiliga væl sloppin, tá ið hugsað verður um støðuna so nógva aðrastaðni.

### Rentan lækkar hjá summum

Men hann staðfestir eisini, at Tryggingarfelagið, Lív, hevur eina rættiliga stóra avbjóðing.

Og hon er, at allir tryggingartakarar, sum hava teknað trygging og eftirløn fyri 2000, hava fingið trygd fyri eini rentu upp á minst 4,5%.

- Tað er ein trygd, sum landskassin hevur veitt tryggingartakarunum og tað sleppur Lív so heldur ikki undan í framtíðini.

Ì fjør fingu allir tryggingartakararnir 5% í rentu og tey, sum hava teknað trygging fyri 2000, koma sostatt í ár at fáa eina trygging upp á tey kravdu 4,5% í ár.

Men tey, sum hava teknað trygging síðani 2000, fara ikki at fáa meiri enn 2,5% í rentu í ár.

Kortini vil Tummas Eliasen ikki kallað hesar tryggingartakararnar fyri teir stóru taparanar.

- Eg haldi ikki, at tað er so galið at fáa 2,5% í rentu í ár, tí stóðu pengarnir aðrastaðni, er stórur vandi fyri, at missurin hevði verið nógvar ferðir størri, kanska hevði talan verið um eitt beinleiðis tap upp á eini 25%.

- Sostatt hava tryggingartakararnir sum so onki mist, men tað er ein avbjóðing hjá felagnum, sigur stjórin í Lív.

- Eg vil enntá siga, at sum støðan er nú, eru okkara tryggingartakarar væl fyri, sigur Tummas Eliasen.

Hann sigur, at orsøkin til, at Lív er sloppið so væl, hóast alt, er at tey hava ført ein varnan politikk á hesum øki, tí tey hava ikki sett meiri enn 15% í partabrøv, men hinvegin stendur nógv tað mesta í lánsbrøvum.

# Samhaldsfasti mist 25 milliónir

**Føroyski eftirlønagrunnurin er ikki sloppin snikkaleysur undan fíggjarkreppuni, men tey hava ansað væl eftir pengunum og tí er missurin ógvuliga avmarkaður**

FÍGGJARKREPPA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Samhaldsfasti Eftirlønargrunnurin hevði ikki so stórt avkast í fjør, sum hann vildi havt undir vanligum umstøðum.

Sostatt mugu vit staðfesta, at heldur ikki føroyski eftirlønargrunnurin er sloppin snikkaleysur undan fíggjarkreppuni, sum herjar allan heimin.

Men skaðin er ógvuliga avmarkaður, tí stýrið fyri grunnin hevur lagt stóran dent á at ansað væl eftir pengunum, nettupp fyri at vansin fyri at missa pengar, skal vera so lítil, sum gjørligur.

### 25 milliónir minni

Sigurd Poulsen, formaður í stýrinum fyri arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin, sigur við Sosialin, at hóast fíggjarkreppa herjar allan heimin, hevur grunnurin havt eitt lítið avkast í fjør.

Men hann staðfestir, at avkastið er einar 25 milliónir minni, enn tað hevði verið undir vanligum umstøðum.

Sostatt hevur kreppan kostað grunninum 25 milliónir í fjør. Men Sigurð Poulsen sigur, at orsøkin til, at missurin ikki er størri, er, at stýrið hevur havt ein ógvuliga varnan politikk á hesum økinum.

Fíggjarognin hjá grunninum er einar 500 milliónir krónur og tær standa lutvíst á bók, lutvíst í lánsbrøvum og lutvíst í partabrøvum.

- Øll sum fáast við partabrøv í hesum døgum hava ásannað, hvussu stórur vandin fyri at missa pengar er, sigur Sigurð Poulsen.

Men hann staðfestir eisini, at missurin, sum føroyski eftirlønargrunnurin hevur havt, er ógvuliga lítið aftur ímóti tapinum hjá øðrum eftirlønargrunnum..

- Aðrastaðni hava eftirlønargrunnar beinleiðis mist ein hóp av pengum. Hjá okkum snýr tað seg bara um tað, at avkastið er 25 milliónir minni enn tað hevði verið undir vanligum umstøðum og hóast avkastið er minni enn vanligt, er kortini talan um eitt lítið avkast.

Sostatt er arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin í eini heilt øðrvísi og betri støðu enn so nógvir aðrir grunnar.

### Mist avkast

Sigurð Poulsen sigur, at eini 7-8% av fíggjarognini hjá grunninum stendur í partabrøvum, men fyri at spjaða vágan, er peningurin settur í nógv ymisk partabrøv.

- Partabrøvini, sum grunnurin eigur, eru fallin gott 40% í virði í fjør. Men afturfyri hevur restin av pengunum, sum stendur í lánsbrøvum og á bók, givið so frægt, at tilsamans er talan um eitt lítið avkast upp á umleið 0,5%.Vanlig ár plaga avkastið at vera umleið 4%.

Sigurð Poulsen sigur, at statslánsbrøv realkredittlansbrøv eru trygg lánsbrøv.

Hann heldur ikki, at støðan, sum nú er íkomin, gevur orsøk til at endurskoða politikkin hjá grunninum.

- Vit endurmeta støðuna alla tíðina, men vit halda, at vit hava verið rættiliga varin og vit halda ikki, at orsøkin er til at broyta grundregluna, vit arbeiða eftir. Tað er vági í virðisbrøvum og tí spjaða vit virðisbrøvini fyri av avmarka tapsvandan mest gjørligt, sigur Sigurð Poulsen.